Havnar leksikon:

# Lagið »Rasmus« á donskum



*Birni Dam (1937-1980) og Simme Jacobsen*

Í 1960 gav danski bólkurin Blue Boys út plátuna "Rasmus", sum Birni Dam og Simme Jacobsen høvdu skrivað.

Um onkur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesa myndina, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon 314647 ella 214647.

*Myndaeigari: Føroya Fornminnissavn*




*Plátuhúsin á donsku útgávuni*

# Finna stuttligast skemtara

Tað verður skemt fyri allar pengarnar, tá Føroya stuttligastu undirhaldarar fara at kappast um Føroyameistaraheitið í stuttleika í ítróttarhøllini á Giljanesi tann 3. september

Ítróttarhøllin á Giljanesi verður leygarkvøldið 3. september klokkan 19.00 karmur um skemtiligasta borðhald, sum nakrantíð er hildið í Føroyum, siga fyrireikararnir - Stuðlafelagið hjá FS-Vágum 2004

Tá fara útvaldir skemtarar úr øllum landinum, at kappast um, hvør kann gerast føroyameistari í skemti.

Høvuðsvinningurin er ferð á virði 12000.- kr, og onnur virðiløn verður vikuskiftisferð fyri tvey við Atlantic Airways.

Skemtararnir, sum fara at kappast, eru valdir út, hvør í sínum parti av landinum.

**Suðuroy** (Goya) Petur Dahl Nolsøe
**Sandoy** Fríðhild Winther
**Suðurstreymoy** Jóhan Dalsgaard
**Norðstreymoy** Holgar Nielsen
**Vágoy** Marjun í Kálvalíð
**Suðureysturoy** Hilmar Jan Hansen
**Norðureysturoy** Essa Jacobsen
**Norðoyggjar** Hans Hjalti Skaale

Skemtararnir fáa 10 - 15 minuttir í part til at vita, hvussu nógvar áhoyrarar teir klára at fáa at pissa í buksurnar av látri.

Borðreitt verður við breyði og góðum føroyskum viðskera og øli ella sodavatni. Eisini verður felagssangur við skemtivísum, sum ikki hava verið alment frammi áður.

Aftan á borðhaldið verður góður dansur við:
Rolling Stones jam
Creedence Clearwater Revival jam
og Rok.

Atgongumerki verða at fáa til keyps í kunningarstovunum kring landið frá 15. til 30. august - og so er tað ókeypis at ferðast gjøgnum Vágatunnilin hetta kvøldið.

Sosialurin
Sosialurin i